**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI SUND**
**SB_Sund_Sund_2020_4**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðhefta kortskjali 1, partur av matr. nr. 1c, 1e, 1f, 3a, 3b og 4c, Sund og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa vinnuvirkir á økinum.

Stk. 2. Økið liggur í einum B6 øki[1], sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til vinnuvirkir, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

Stk. 3. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til vinnuvirkir, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi. Harumframt verður øki tryggjað til verandi elverk og seinni útbygging av verkinum.

Stk. 2. Virkini í økinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 5 til 7 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

## §4 VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,4 fyri umráðispartin sum heild.

[1]B6 øki sambært uppskotinum til endurskoðan av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu 2020.

Stk. 2. Hæddir á húsum skulu verða settar í hvørjum einstøkum føri út frá heildarmeting av nýtslu og skapi.

Stk. 3. Bygging skal ikki vera staðsett nærri bryggjutromu enn 20 m.

## §5. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §6. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 23/10361 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 12/1-2024 |
| Váttað: | K Poulsen |



**Tórshavnar Kommuna**

**Býarskipanardeildin**

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Sund |
| **Undirheiti** | Kort 1 |
| **Mát** | 7000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | 09.07.2020 | **Journal** | 20/01015 | **Tekna** | RVH |